# Røða sum Tom Joensen, helt í sambandi við at Korndalsgarður alment varð tikin í nýtslu.

**Góðu øll tit, ið eru komin saman her í dag.**

**Hendingar og broytingar**

Tað eru hendingar og dagar, ið heimssøguni, sum seta sjónlig spor. Somuleiðis er við bygdasøguni eins og í lívinum hjá hvørjum einstøkum. Hetta kunnu verða dagar tá ið eitthvørt ógvusligt hendi, syrgiligt ella gleðiligt.
Dagurin í dag, er ein av merkisdøgunum í søguni hjá Eiðis kommunu. Vit kunnu nú fegnast um, at nýggjur dagstovnur verður tikin í nýtslu og at vit harvið fáa enn betri skipaði viðurskifti um smábarnaøkið í kommununi.
Ikki tí, vit hava í mong ár havt skipaða dagrøkt, ið hevur tænt sínum endamáli. Tøkk hava tey uppiborna, ið hava starvast har ella hava havt tilknýtið til hesa skipan.
Tíðin tá fólk hildu tað verða eina sjálvfylgju at hava arbeiði í bygdini, er farin. Fyrr var tað soleiðis, at tað stórt sæð bert vóru sjómenn, ið forvunnu sær lønina uttan fyri eingjagarðarnar.
Í dag er veruleikin tann, at tað gerast alt fleiri fólk, ið vinna sær pening á øðrum stað, men kortini búgva í kommununi. Hetta er ein veruleiki, ið vit mugu fyrihalda okkum til.
Tí er henda íløgan hjá kommununi í veruleikanum ein framtíðaríløga, ið er við at tryggja borgarum góðar og virðiligar umstøður eisini á hesum økinum.
Tað, at vit í dag alment lata Korndalsgarð upp, er ein nátúrlig menning av júst hesum parti av kommununar uppgávu.
Tað at vilja framá, mennast og broyta til tað betra, er nakað, ið er flestu menniskjum íborið. Frambrot krevja ofta, at vit mugu lata okkurt fara fyri nakað betri.
Í mínum barnadøgum, eg eri uppvaksin í Korndali, vóru nøkur støð, ið vit fingu at vita vóru vandamikil. Støð har vit ikki máttu fara uttan saman við vaksnum fólki.
Eitt stað var kajin. Vit fingu at vita, at har helt sjókúgvin til. Annað stað var Skarðið. Bygdin hevði av royndum sannað, at har var vandamikið.
Seinnu helvt av sjeytiárunum gjørdu hugsjónarmenn av fremja stórbroytingar á havnaøkinum. Tað fyrr so vandamikla Skarðið varð sprongt og nýtt til grótkast. Ein øgilig íløga og eitt megnartak fyri eina lítla kommunu. Men har liggur nú Skarðið sum ein verjugarður fyri øllum tí virksemi, ið hevur verið, er og fer at verða á havnalagnum.
Annað vandamikið stað var Hólmin. Í Hólmanum búði nykurin og hann var ikki góður at koma í holtur við, tað vistu vit. Hann vildi taka børn, og so var hann eisini øgiliga sterkur. Um hetta vóru sjónlig tekin heima í bygdini.
Tí var lættin øgiligur, tá vit smádreingir ein dagin frættu, at nú hevði Hans Egil skotið nykin!
Tað er hugaligt at staðfesta, at eisini hetta einaferð so vandamikla stað, nú er við at gerast staðið har okkara smáu kunnu verða trygg undir góðum umstøðum.
Men eg kann ikki lata verða við at nevna, at um tað gongst sum samtykt í bygdaráðnum sigur, og sum ein stórur partur av borgarunum í kommununi skrivliga hevur tikið undir við, hava vit gott í væntu. Tá kunnu vit av sonnum siga, at Hólmin kemur til heiður og æru.

**Familjan, uppalingin og tíðin**

Ein tann størsta broytingin seinastu fjórðingsøldina er, at umhvørvið haðani børnini koma er so ómetaliga nógv broytt í mun til tað, ið fyrr var. Hesar broytingar eru sjónligar í familjumynstrinum og koma sostatt eisini at síggjast aftur í uppalingini.
Í einum tilvildarligum skúlaflokki í høvuðsstaði okkara var fyri árum síðani ein kanning gjørd um familjuviðurskiftini. Har vísti tað seg, at av teimum 21 børnunum í flokkinum búðu 9 ikki saman við báðum foreldrunum. Av hesum 9 var tað bert ein, sum ikki hevði fingið ein nýggjan papp-pápa.
Hesin veruleiki, saman við tí sannroynd, at tað eru nógv børn her um okkara leiðir, har annað ella bæði foreldrini hava annan etniskan ella tjóðskaparligan uppruna, kemur so ella so at hava stóra ávirkan hvussu familjurnar meta um uppaling barnanna.
Júst í hesum liggur ein stór uppgáva hjá barnagørðum og skúlum. Samstundis sum vit eiga at virðismeta og góðtaka ymiskleikar, so er eisini alneyðugt, at júst hesir stovnar menna eina felagskenslu og felagsvirði, sum vit halda okkum kunna standa við sum tjóð. Uttan felagskenslu og felagsvirði fáa vit eitt samfelag, har hvør sætar sær og leggur vertin á hvat annar fær.
Í míni lestrartíð, ið var fyrra part og um miðju áttatiárini, komu vit javnan fram á hugtakið “kvalitetstíð”. Hetta var tá eitt nýtt hugtak, ið var sprottið millum hart arbeiðandi og ambitiøs foreldur inni á meginlandinum. Í hugtakinum lá, at tað var ikki avgerandi hvussu langa tíð tú hevði saman við barninum, men heldur hinvegin at avgerandi var at tíðin bleiv brúkt so skilagott sum gjørligt.
Samfelagshjólini mólu títt tá. Tað gera tey eisini nú.
Góðu foreldur. Tað er mín sannføring, eftir at hava arbeitt við og millum børn og ung í mong ár, at fyri teimum er einki, ið kallast kvalitetstíð. Hjá børnunum er tað nóg mikið, at vit sum foreldur hava tíð og geva okkum tíð bert at vera. Hetta er nakað, ið vert er at hugsa um, nú børnini eru so stóran part av degnum á stovni ella í skúla. Vit eiga av og á at lata tíðina verða tíð og einki annað.

Á uppslagstalvuni í skúlanum hava vit hesa áminning hangandi:
Eitt barn, ið verður lastað
lærir at fordøma
Eitt barn, ið verður bankað
lærir at berjast
Eitt barn, ið verður háðað
verður smæðið
Eitt barn, ið verður spottað
fær ringa samvitsku
Men eitt barn, ið verður eggjað
lærir sjálvsálit
Eitt barn, ið verður møtt við tollyndi
lærir at verða tolið
Eitt barn, ið verður róst
lærir at virðismeta
Eitt barn, ið upplivir rættvísi
lærir rættvísi
Eitt barn, ið upplivir vinarlag
lærir blíðskap
Eitt barn, ið upplivir tryggleika
verður vóngott.
Eitt barn, ið er elska
lærir at kenna kærleika

Eg fari at enda at ynskja starvsfólkunum hepna hond við arbeiðinum og ynskja okkum øllum til lukku við Korndalsgarði.